

# Vakrar fløkjur og perlur

**Við einum vælspælandi bólki aftanfyri seg borðreiddi Teitur við nýggjum og gomlum, tá hann gestaði Stóra VEGA í Keypmannahavn í vikuskiftinum**

UMMÆLI ★★★★★★

*Petur Háberg*
*petur@sosialurin.fo*

Seinastu tíðina hevur Teitur havt úr at gera við at lesa fimm- og seksstjørnað ummæli av sínari spankandi nýggju fløgu 'The Singer'. Nú veit eg ikki, um Teitur yvirhøvur lesur hesi ummæli. Kundi ímyndað mær Teitur sum ein, ið als ikki gav sær far um slíkt. Men hvussu er og ikki, so stroya ummælarar gávumilt út við rósandi orðum. Eitt meistaraverk, verður sagt.

Um hetta var orsøkin til, at Stóra VEGA næstan var útselt leygarkvøldið, er ikki til at vita, men í øllum førum vóru nærum 1500 áhoyrarar komnir fyri at lurta eftir Teiti.

### Helgi hitaði upp

Áðrenn Teitur slapp framat, spældi Helgi Jónsson fólkini heit. Umframt at vera fyrrverandi dragbasunistur í íslendska bólkinum Sigur Rós, so er Helgi ein partur av bólkinum, ið spælir undir hjá Teiti í hesum døgum. Vakrir, sveimandi sangir, ið leiddu tankarnar til Jeff Buckley og Jón Þór Birgisson (Sigur Rós).

### Ikki vers-brúgv-niðurlag

Eftir ein lítlan steðg var tíð til høvuðsrættin.

Teitur legði út við dramatiska 'Guilt by Association', og síðani fylgdu fleiri løg av nýggju útgávuni. Sera annarleiðis og nýskapandi.

Sum Teitur nevndi í einari samrøðu herfyri, so minnir nýggja tilfarið ikki sørt um filmstónleik. Dramatiskt og forteljandi. Ikki tað vanliga vers-brúgv-niðurlag, men nógvir steðgir og nógv temposkift. Sum um, at hvørt slag og hvør tóni er eitt sera tilvitað og gjøgnumhugsað val. Alt óneyðugt er skorið burt.

Nú vildi onkur hildið, at hetta ljóðar sum eitt verri rót. Og tað



*Bólkurin, sum spælir við Teiti í hesum døgum, ger sítt arbeiði til lýtar*